## Ferðasíðan hjá Sosialinum

62°N

# Eitt vikuskiftið við vælveru í Reykjavík

**Set teg sjálvan í miðdepilin nakrar dagar, gloym gerandisdagin og njót íslendska vælveru, tá hon er allarbest.**
**Eitt vikuskiftið í Reykjavík, har vælvera er á skránni, er balsam fyri likam og sál.**

Bláa Lón er ein serstakur heimur av lekjandi megi, vælveru og vakurleika. Lónin er grundað á eina einastandandi keldu av jarðhitaðum sjógvi, sum hevur sín uppruna í víðgongdu náttúru Íslands. Ferðafólk njóta at svimja og slappa av í jarðhitaða sjónum í Bláa Lón, sum er vælkent fyri sína góðu ávirkan á húðina. Ein vitjan í Bláa Lón fremur samlag millum likam, sál og sinn og gevur einum møguleika fyri at bloyta burt strongdina, ið stendst av nútíðar lívshátti. Eitt úrval av Bláa Lón kur-viðgerðum og massasjum í vatninum eru tøkar. Tær fyriganga í lónini og, fríska luftin og natúrliga umhvørvið, økja um kensluna av vælveru.

### Prísdømir:

**Bláa Lón**
Flutningur aftur og fram frá Reykjavík til Bláa Lón + atgongumerki kr. 250,-
Hesin prísur er galdandi við keyp frá 62°N travel, áðrenn fráferð. Prísir fyri tær ymisku massasjurnar og kurviðgerðirnar finnast á www.bluelagoon.is

**Kinversk massasja**
Aksla, høvur og fót massasja:
prísir úr isk. 4.700,-

Prísur **Kr 3.095,-**
fyri hvønn dupultrúmi
Eyka fyri einarúm kr. 820,-
Galdandi frá 1. nov. til 31. des. 07

*Fyrvarni verður tikið fyri prentvillum og prishækkingum

**Íroknað prísin er:**
- Flogferð Vágar – Reykjavík t/r, matur og drykkivørur umborð á Atlantic Airways, gisting í dupultrúmi á Hotel Loftleiðum í 3 nætur v/morgunmati.

**Ikki íroknað:**
- Ferða-og avlýsingartrygging
- Flutningur og atgongd til Bláa Lón
- Kinversk massasja

### Hotel Loftleiðir

Hotel Loftleiðir er eitt 4* hotel. Hotellið liggur í útkantinum av Reykjavík, men ókeypis shuttle bussur koyrir til miðbýin fleiri ferðir um dagin.
Kømurini hava køliskáp, sjónvarp, telefon, buksupressu og hárturkara. Eisini er møguleiki at gera sær te og kaffi á kamarinum.
Hotel Loftleiðir er ikki bara eitt hotel, ið bjóðar gisting, men hevur so ómetaliga nógv annað at bjóða gestum sínum.
Á hotellinum er 1. flokks matstova, Restaurant Lon, nýmótans og vælumtókt barr, hárfríðkanarstova, handil, ið selur íslendskar sniðgevaravørur, ferðadiskur, gallarí, svimjihylur, gosbað og sauna. Eisini er fittness sentur.









### Kinversk massasja

Á hotel Loftleiðum er kinversk massaga.
Massasjustovan er tað fullkomna staðið, tá tú vilt hava ein steðg frá tuskanini í gerandislívinum og slappa av við einum góðum fótabaði, aksla- og fótmassasju

"Dong Fang Salon" leggur dent á samkipanina millum sinn, likam og sál við partvísari massasju. Massasjan byrjar við aksla- og høvurmassasju og endar við heildarmassasju av føtrunum.

Upplatingartíðirnar eru gerandisdagar frá kl.11.00-17.00 og leygardag frá kl.10.00-17.00. Best er at bíleggja í góðari tíð. Ringjast kann á tlf. +354 444 4085.

*Les meira á www.icehotels.is og vel Hotel Loftleiðir*



ATLANTIC AIRWAYS

62°N

**Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn**
**Tel: 34 00 00 / 34 00 60 • Fax: 34 00 11**
**booking@62n.fo**
**www.62n.fo**